"Lille Eyolf"

# Ibsen gnagar í lívslygnini



**Hóast boðskapurin var heldur ovurtýðiligur í løtum, gjørdu framúr góðu leikararnir "Lille Eyolf" til eina sjónleikaupplivingav teimum heilt stóru**

SJÓNLEIKUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Leikurin "Lille Eyolf", ið leikarar á Kongaliga Leikhúsinum spældu í Norðurlandahúsinum í gjárkvøldið, er eitt gott dømi um, hvussu viðkomandi leikirnir hjá Henrik Ibsen framvegis eru. Hóast 100 ár eru liðin, síðani Ibsen doyði, er lívslygnin tann sama, men leikskaldið gevur framvegis onki svar – bara eina røð av spegilsmyndum, har vit kunnu hyggja at okkum sjálvum – um vit tora.

## Livani áminning

"Eg eri líkaglað við tínum inniligleika. Eg vil hava teg fult og heilt. Og heilt fyri meg sjálva! Soleiðis, sum eg hevði teg fyrstu undurfullu tíðina. Eg finni meg ikki meg ikki í at skula taka til takka við avlopi og leivdum".

Orðini eigur tann heitblóðuga Rita Allmer í "Lille Eyolf", sum er enn ein av kvinnunum hjá Ibsen, ið ikki megnar at temja sína erotisku trá. Maður hennara Alfred livir hinvegin í einum meir andligum luftlag – meir høvd enn kroppur og støðugt í holt við at skapa stórar, gyklandi ætlanir, heldur enn at geva seg til kærleikan, sum liggur beint framman fyri honum; longsulin hjá konuni og trúskapin hjá hálvsystrini Astu.

Ímillum hjúnini stendur harumframt lítli Eyolf, sonur teirra, ið er lammaður, tí hann sum heilt lítil datt av einum borði, tí foreldrini ikki gáaðu eftir honum í teirra villa ástarleiki. Sitandi í sínum koyristóli, hevur lítli Eyolf soleiðis altíð verið ein livandi og syrgilig áminning um, hvørjar avleiðingar tað kann hava, at geva eftir fyri síni girnd. Meðan hjúnini ikki megna at tosa um hendingina, sleppur skuldarkenslan at gnaga seg longur og longur inn, til Rita í vónloysisøði skríggjar, at hon vildi ynskt, at lítli Eyolf ongantíð varð føddur. Alfred í sínum lagi roynir at køva samvitskubitið við at leggja stórar ætlanir um, hvussu lítli Eyolf skal fullgera hansara lívsverk, at skriva bókina lidna um "Ta menniskjaligu ábyrgdina".

## Er tað nakað, sum gnagar?

Speisemið svíður, meðan tey bæði íðin royna at seta orð á, hvussu vend nú skal koma í, uttan at vita, at Ibsen er í ferð við at avdúka tey so náðileyst, at tað stendur eftir. Her skrivar "Lille Eyolf" seg rættiliga týðiliga inn í tátíðarinnar "borgarligu sjónleikir", sum fyrst av øllum settu sær fyri at avdúka lívslygnina, sum tað betra slagið yvirlivdi uppá og í kraft av. Og tað var eisini hetta temaið, ungi leikstjórin Jo Strømgren í